*»… veðurútlitini eru hampilig. Hann sigur minkandi vind og turt. Nú má antin bera ella bresta, tí bátafestivalurin í Vestmanna verður longu leygardagin eftir…«*

*(Høgni W. Høgnesen, formaður í Bátafelagnum)*

*»... stóra brakið á bátafestivalinum er stórdansurin, sum verður í tjaldinum. Tá fer contrykongurin, Hallur Joensen, við sínum bólki at skipa fyri góðum dansi...«*

*(Høgni W. Høgnesen)*

drúgvur. Tí er vanligt, at summir bátar antin liggja og damla úti á vánni ella sigla sær ein lítlan túr, kanska suður á Garðsenda, meðan bíðað verður eftir teimum, ið eftir eru.

- Tað er umráðandi, at fólk, sum ætla sær at síggja bátarnar stevna inn í havnina, vita, nær tann løtan er, leggur hann aftrat.

### Hava stórt tjald

Bátafelagið hevur keypt sær eitt stórt tjald, 12 x 30 metrar, sum annað árið á rað verður karmur um ein stóran part av tiltøkunum, sum verða á festivaløkinum.

- Dúkarnir og konstruktiónin tola í prinsippinum 30 m/sek., men í so nógvum vindi er neyðugt, at tað tjaldið verður tjóðrað fast við góðum heftum.

Í ár verður gólv lagt niðuryvir betongið í tjaldinum, so tað verður hugnaligari og bleytari at fara út á dansigólvið.

Høgni vísir á, at veðurvánirnar fyri festivalin leygardagin eru hampiliga góðar, og hann vónar eisini, at veðrið verður uppaftur blíðari, enn hann sigur.

- Enn eru nakrir dagar eftir til leygardagin, og nú hava vit havt ruskut veður í fleiri dagar. Tí kunnu vit bara vóna, at líkindini verða góð, tá leygardagurin kemur, sigur hann.

Á skránni fyri festivalin, sum eisini er prentað í blaðnum í dag, eru eitt nú hoppiborgir og rodeo-tarvur, sum børn og onnur kunnu royna seg á.

Tíðliga leygardagin seinnapart letur ein avmarkað sølumessa upp, og tá verður eisini høvi hjá fólki at keypa sær pylsur í pylsuvogni og breyð og annað at mata sær við í tjaldinum.

Høgni sigur, at umframt at MC-felagið kemur á festivaløkið við nógvum motorsúklum, koma eisini fleiri húsvognar á økið.

- Longu klokkan 16 leygardagin kunnu fólk keypa sær teir vælumtóktu festival-búffarnar við grønmeti og sós, sigur hann.

### Fyrilestrar og tónleikaundirhald

Tríggir tónleikarar fara eisini at undirhalda á festivaløkinum leygardagin og leygarkvøldið.

Klokkan 16 fer Sámal Ravnsfjall á pall, klokkan 18 verður tað Hallur Joensen við sínum bólki, og klokkan 21 fer Martin Joensen á pallin.

Umframt hesi tiltøk, sum saman við skránni annars kunnu savna væl av fólki, verða eisini tveir áhugaverdir fyrilestrar í matarhøllini hjá Faroe Seafood.

Hin fyrri, sum byrjar klokkan 18, verður um Fiskamarknað Føroya, og her verður tað stjórin og toftamaðurin, Jens Chr. Olsen, sum fer at kunna um virksemið.

Klokkan 18.30 fer Knud Simonsen at greiða frá sonevndu Húk-skipanini, og hesin fyrilesturin verður eisini í matarhøllini hjá Faroe Seafood.

Høgni W. Høgnesen sigur, at eitt, sum plagar at hava stóran áhuga á festivalinum, er afturvendandi tiltakið við eini skemtitekning, sum ímyndar fólk í økinum.

- Skipað verður soleiðis fyri meksikanskari uppboðssølu av hesi tekning, sum hesaferð er av nøkrum kendum kvinnum í økinum. Sum vanligt er, eru tær í einum báti.

Uppboðssølan byrjar leygardagin klokkan 19.30. Í fjør var Bill Justinussen uppsøluhaldari, og árið fyri var uppsøluhaldarin Torbjørn Jacobsen, báðir núverandi løgtingsmenn.

Enn er ikki greitt, hvør uppboðssøluhaldari verður í ár.

Formaðurin í Bátafelagnum sigur, at fyri hvørt boð, sum verður latið, rindar bjóðarin 50 krónur, og tá tað so líður móti endanum, rinda bjóðarar 100 krónur fyri hvørt boðið.

- Vit hava soleiðis fingið millum 13.000 og 18.000 krónur inn fyri hesa tekning, leggur hann aftrat.

### Stórdansur í tjaldi

Stóra brakið á bátafestivalinum er stórdansurin, sum verður í tjaldinum og byrjar klokkan 23 leygarkvøldið. Tá fer contrykongurin, Hallur Joensen, við sínum bólki at skipa fyri góðum dansi, sum plagar at verða væl vitjaður.

Høgni W. Høgnesen sigur, at nógv og stór tøk skulu takast fyri, at alt skal koma undir land til eitt slíkt tiltak, og hann er vegna Bátafelagið í Nes kommunu sera fegin um allan tann stuðul, sum tiltakið hevur fingið, bæði frá kommunu og fólkinum í økinum.

- Uttan stóra hjálp og góðan stuðul hevði hetta slett ikki borið til. Nú vóna vit øll, at vit fáa ein góðan og væleydnaðan bátafestival leygardagin, sigur hann.

## Skráin fyri Bátafestivalinum 9. mai 2009

Kl. 12.00 Hoppiborgir, Rodeo-tarvur

Kl. 12.30 Bátar savnast í Skálafirði

Kl. 13 30 Seta kós ímóti Toftum

Kl. 14.00 Pylsuvognurin letur upp

Kl. 14.00 Sølumessa letur upp

Kl. 14.30 Føroya Harmonikufelag spælir við bátahylin

Kl. 15.00 Móttøka í "Oyrahavnini" á Toftum

Kl. 15.00 Bàtafelagið er vertur fyri borðhaldi v/ suppu við meira í matarhøllini hjá Faroe Seafood (Nyki)

Kl. 15.00 Mc-felagið kemur við motorsúkklum á festivaløkið

Kl. 15.15 Matstovan letur upp í tjaldinum

Kl. 16.00 Søla av "festivalbúffum" v/ grønmeti og sós

Kl. 16.00 Sámal Ravnsfjall undirheldur á festivaløkinum

Kl. 18.00 Hallur Joensen & Co undirhalda á festivaløkinum

Kl. 18.00 Fyrilestur um Fiskamarknað Føroya v/ Jens Chr. Olsen í matstovuni hjá Faroe Seafood

Kl. 18.30 Fyrilestur um HÚK-skipanina v/ Knud Simonsen í matstovuni hjá Faroe Seafood

Kl. 19.30 Skemtitekning verður seld á meksikanskari uppboðssølu á festivaløkinum, hesaferð manna kvinnurnar ”bátin”

Kl. 21.00 Martin Joensen undirheldur á festivaløkinum

Kl. 23.00 Stórur dansur í tjaldinum við ”contrykonginum” Halli Joensen v/ tónleikabólki

Kl. 02.30 Drigið verður um lutaseðlar